## Óvæntaður vøkstur

Framburðurin í altjóða búskapinum er størri, enn Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, hevði roknað við. Aðalstjórin í grunninum, Dominique Strauss-Kahn, segði í gjár, at vøksturin í ár verður helst oman fyri tey trý prosentini, sum grunnurin higartil hevur mett. Hann gjørdi tó vart við, at tað er stórur munur á vøkstrinum í teimum ymsu heimspørtunum. Í teimum vanligu ídnaðarlondunum er vøksturin nær tengdur at almennum stuðulstiltøkum. Tann størsti vøksturin í bruttotjóðarframleiðsluni er haraftur-ímóti í teimum sokallaðu vakstrarbúskapunum í Asia.



## Færri bretar arbeiðsleysir

Í Bretlandi er tað komið óvart á serfrøðingar, at arbeiðsloysið minkaði í tíðarskeiðinum frá september til november í fjør. Hagstovan í London sigur, at 7.000 færri bretar vóru arbeiðsleysir í november enn í september. Broytingin er kortini ikki stór, tí í november vóru framvegis næstan 2,5 milliónir bretar arbeiðsleysir ella 7,8 prosent av teirri arbeiðstøku fjøldini. Greinarin Howard Archer á stovninum IHS Global Insight sigur við The Guardian, at hóast tann lítla batan seinasta heyst má roknast við, at arbeiðsloysið í Bretlandi fer at veksa í ár.

# Klaksvíkingar við skemtileiki

**Láturvøddarnir fáa harða venjing, nú Klaksvíkar Sjónleikarafelag fer á pall við heimskendum glantrileiki**







*Myndir frá nýggja skemtileikinum hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag »Stundum, stundum ikki«*
*Myndir: eybii*

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Eitt vikuskifti á einum baðihotelli í Kirkjubø endar í eini øgiligar fløkju, tá Klaksvíkar sjónleikarafelag fer á pall leygardagin við glantrileikinum »Stundum, stundum ikki«.

### Skemtileikur í hægsta potensi

Leikurin byggir á íslendsku útgávuna av glantrileikinum »Weekend in Paradise« eftir kenda týska leikritaparið Arnold & Bach.

Í føroysku útgávuni »Stundum, stundum ikki« eru vit í einum av føroysku aðalráðunum, har starvsfólkini seta sær fyri at bøta um starvsfólkatrivnaðin. Í eini roynd at sjóva starvsfólkahópin saman, gongur leiðin til Kirkjubø, har ætlanin er at taka sær av løttum eitt vikukifti á einum baðihotelli. Hugnaliga samveran endar tó, sum í øllum góðum glantrileikum, í eini fløkju av misskiljingum. Hvat hetta ger við sokallaða starvsfólkatrivnaðin, fara vit ikki at avdúka her. Fyribils kann Klaksvíkar Sjónleikarafelag tó vissa um, at fólk veruliga sleppa at royna sínar láturmusklar í út við tveir tímar.

- Hetta er ein skemtileikur í hægsta potensi - ein sannur klassikari innan góða gamla slagi av glantrileikum, sigur Rudolf Joensen, formaður í Klaksvíkar Sjónleikarafelag.

Hann greiðir frá, at leikurin hevur verður sýndur kring allan heim - ofta við heilt stórum komikara talentum. Í donsku útgávuni hevði Dich Passer til dømis ein av høvuðsleiklutunum.

### Nógv venjing

Allar góðar sjónleikarakreftir, bæði yngri og eldri, eru eisini savnaðar í nýggja leikinum, har heili 16 leiklutir skulu mannast. Millum teir 14 leikararnar síggjast fleiri kend andlit sum til dømis Jan Gardar og Jógvan Eliasen, sum nú gera rættiligt come-back á palli.

Íslendska Saga Jónsdóttir hevur leikstjórnað, og hennara drúgvu royndir eru veruliga komnar leikararnum til góðar undir venjingunum.

- Í einum glantrileiki er timingin til dømis heilt avgerandi. Hetta krevur rættiliga nógv av bæði einstaka leikaranum og serliga samspælinum, so her liggur nógv leikstjórn og venjing aftanfyri, sigur Rudolf Joensen.

Men nú skuldi alt so verið klárt, og leygardagin fara tey so á pall í Løkshøll í Runavík við fyrstu sýningini.

Lýst verður nærri, nær næstu sýningarnar verða.

# Málandi politistur í Leikalund

**Íblásturin úr Føroyum letur seg ikki fjala í málningunum hjá politistinum Regin Jørgensen, sum í løtuni sýnir fram í Leikalund í Klaksvík**



*Sørvingurin Regin Jørgensen, sum starvast sum politistur í Tønder, hevur tikið pensil og lørift fram aftur*

FRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Málarin, sum í løtuni sýnir fram í Leikalund, hevur eina heldur øðrvísi bakgrund, enn myndamálarar flest. Sørvingurin Regin Jørgensen er nevniliga politistur og starvast hjá greinsupolitinum í Tønder, har hann eisini hevur búð síðani 2007.

### Sum balsam fyri sálina

Regin Jørgensen hevur altíð málað, og longu sum 17 ára gamal sýndi hann fram á fyrsta sinni. Í starvinum sum politistur hevur tó ikki verið so góð tíð til at mála, so í mong ár hevði hann lagt hetta frítíðarítrivið til síðis.

Seinnu árini hevur politisturin úr Sørvági tó tikið pensil og lørift fram aftur, og í dag stórtrívist hann við at mála aftur.

- At standa og mála er sum balsam fyri sálina og tað fær meg ofta at minnast aftur á ta villu føroysku náttúruna, sigur Regin Jørgensen.

Hann málar fyri tað mesta í akryl, og mesta inspiratiónin kemur úr Føroyum, bæði í liti og ljósi. Umframt at mála landslagsmálningar dámar Regini Jørgensen væl at eksperimentera við ymsum málistílum.

Regin Jørgensen hevur sýnt fram nógva staðni, og hevur júst havt eina størri framsýning í Tønderhallerne í Tønder.

Framsýningin í Leikalund er opin fram til 15. februar



*»Gjógv«, Regin Jørgensen, 2009*



*»Dagslys«, Regin Jørgensen, 2010*